# Svensk jazz sax við føroyskum plúmmi

**Hetta vikuskiftið vera føroysk/svenskar jazz konsertir í Havnar Klubba og í Miðlahúsinum í Vágsbotni**

KONSERT
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Havnar Jazzfelag skipar fyri tveimum konsertum við føroyskum/svenskum jazz tónleiki í Havn um vikuskiftið. Tann 25 ára gamli saxofon spælarin Joel Wästberg úr Göteborg í Svøríki fer at spæla saman við teimum trimum plúmmarunum Leivi Thomsen á gittar, Arnoldi Ludvig á kontrabass og Rógva á Rógvu á trummur.

Fríggjakvøldið 12. januar kl. 21:00 spæla teir í Havnar Klubba og leygarkvøldið 13. januar kl. 21:00 spæla teir í Miðlahúsinum.



## Egin tónleikur

Tónleikin sum teir spæla er nýggjur og eldri jazz tónleikur eftir Leivur Thomsen, Arnold Ludvig og Joel Wästberg, sum ikki fyrr er útgivin á fløgu. Joel Wästberg, sum í ár verður liðugur á Göteborg Musik Högskola, kom til Føroyar mánadagin, og kvartettin venur hvønn dag uppundir konsertirnar.

## Framtíðar ætlanir

Joel Wästberg kemur aftur til Føroya í summar tá ið hesir fýra garparnir skulu spæla saman aftur til Summartónar. Síðani verur farið í studio til at gera upptøkur til fløgu útgávu við teirra egna tónleiki




